Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	07.03.2023
Mál nr.:	23/04814
Málsviðgjørt:	JEK
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	17. februar 2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)
(Longd freist fyri at fáa endurrindað meirvirðisgjald av íløgum í almannagagnligt frítíðarvirksemi)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 27 frá 27. februar 2023, verður § 3 a, stk. 2 orðað soleiðis:

1. "*Stk. 2.* Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið sambært stk. 1, skal:
1) talan verða um ikki vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi, har í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum, meirvirðisgjald ikki íroknað, er fingin til vegar sum gáva ella við óløntum og sjálvbodnum arbeiði, sjálvbodnari innsavnan, undir hesum vanligum og staðbundnum kirkjuskatti,
2) arbeiðið, sum meirvirðisgjald kann verða endurgoldið fyri, vera byrjað eftir 1. januar 2013 og endað í seinasta lagi 5 ár eftir, at umsókn er góðkend, og
3) umsókn um endurgjald fyri inngangandi meirvirðisgjald vera móttikin av TAKS í seinasta lagi 31. desember 2025."

2. Í § 3 c, stk. 4 verður "30. juni 2023" broytt til: "31. august 2023".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Verkætlanir, ið eru farnar í gongd áðrenn 31. desember 2022 eru eisini fevndar av løgtingslógini.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Freistin fyri nær søkjast kann um at fáa endurrindað meirvirðisgjald av íløgum í almannagagnligt frítíðarvirksemi gekk út 31. desember 2022. Neyðugt er tí at leingja umsóknarfreistina, um henda skipanin skal halda fram.

1.2. Galdandi lóggáva
Felagsskapir, stovnar og grunnar, ið gera íløgur fyri meira enn 1 mió. kr. (mvg ikki íroknað), kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið inngangandi meirvirðisgjald av samlaða íløgukostnaðinum.

Treytirnar fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjaldið eru:
1) at talan ikki er um vinnuligt virksemi
2) at talan er um almannagagnligt frítíðarvirksemi
3) at í minsta lagi 33% av samlaða íløgukostnaðinum er fingin til vegar sum gáva ella við óløntum og sjálvbodnum arbeiði

Arbeiðið, sum meirvirðisgjald kann verða endurgoldið fyri, skal vera endað í seinasta lagi 5 ár eftir, at umsókn er góðkend.

Endurgoldið meirvirðisgjald skal rindast aftur í landskassan um íløgan verður seld ella ikki longur verður nýtt til ætlaða virksemið og til almannagagnligt frítíðarvirksemi, sí § 8 í kunngerð nr. 11 frá 7. februar 2018 um meirvirðisgjald fyri ikki vinnuligt og almannagagnligt frítíðarvirksemi. Sambært galdandi løgtingslóg skal umsókn um endurgjald vera móttikin av TAKS í seinasta lagi 31. desember 2022.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Hildið verður, at hetta er ein góð skipan, ið stuðlar felagslívinum kring landið, og at skipanin eigur at halda fram. Mælt verður til, at freistin verður longd við trimum árum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið hevur við sær, at freistin fyri nær søkjast kann um at fáa endurrindað meirvirðisgjald av íløgum í almannagagnligt frítíðarvirksemi verður longd við trimum árum, frá 31. desember 2022 til 31. desember 2025.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Inntøkurnar frá meirvirðisgjaldi fella til landskassan, og tí er tað landið, ið ber kostnaðin, tá meirvirðisgjald verður afturrindað.

Um hugt verður at teimum seinastu 4 árunum, so er tað eitt sindur ymiskt, hvussu nógv hevur verið endurrindað árliga.

Í 2019: 16,6 mió. kr., í 2020: 21,0 mió. kr., í 2021: 20, 5 mió. kr. og í 2022: 10,2 mió. kr.

Í miðal hevur verið endurrindað 17,1 mió. kr. árliga eftir § 3 a (almannagagnligt frítíðarvirksemi).

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Sambært TAKS hevur afturberingarskipanin ikki nógva umsiting við sær.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri byggivinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri felagsskapir, ið gera íløgur í almannagagnligt virksemi. Hesi kunnu nú fáa mvg-afturbering í 3 ár afturat.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið er í samsvari við millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið sampakkar við hesar tvørgangandi sáttmálarnar:

1) **Hoyvíkssáttmálan**

2) **Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS**

3) **Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki kendar markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur við sær, at tey, sum gera íløgur í almannagagnligt frítíðarvirksemi framhaldandi sleppan undan meirvirðisgjaldi av íløguni.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri plass ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1
Afturberingin av meirvirðisgjaldi eftir § 3 a í meirvirðisgjaldslógini (almannagagnligt frítíðarvirksemi) verður við uppskotinum longd við trimum árum frá 31. desember 2022 til 31. desember 2025.

Samstundis verður ásetingin víðkað soleiðis, at tað nú beinleiðis framgongur av lógartekstinum, at kirkjuskattur verður javnsettur við innsavnan av gávum, og samsvarar hetta við eina áralanga umsitingarliga siðvenju, sum hevur sítt grundarlag í, at vit í Føroyum hava trúðarfrælsi, har tað stendur øllum frítt at melda seg inn í ella út úr einum kirkjufelagsskapi. Kirkjuskatturin er tí meira ein gáva enn ein skattur.

Nr. 2
Við løgtingslóg nr. 27 frá 27. februar 2023 um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald varð freistin fyri endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av plug-in hybridakførum longd frá 30. juni 2023 til 31. august 2023. Av misgáum varð freistin fyri, nær akfarið skal verða skrásett ikki broytt samsvarandi. Tað verður gjørt við hesi broyting.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Umframt gildiskomu er ásett ein skiftisregla, sum fevnir um verkætlanir, ið eru settar í gongd áðrenn 31. desember 2022. Hesar verkætlanirnar eru eisini fevndar av løgtingslógini.

Fíggjarmálaráðið, 7. mars 2023

Ruth Vang
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur